

*Familjan flutti til Svínoyar við sjey børnum, hundinum Perla og tveimum hamstarum, sum í dag hava sjey ungar*

*Framhald av síðu 7*

halda so avgjørt, at tað koma heilt onnur virði til sjóndar, tá ein býr á einum smáplássi.

- Børnini hava fingið eyguni upp fyri, at tað eru onnur ting til enn passivt undirhald og tann nýggjasti mótin. Og eg haldi, at ein veruliga gevur sær stundir til at hugsa um tilveruna á einum smáplássi, sigur Rakul, sum heldur at kvalitetstíð er nakað tvætl, í øllum førum í hennara familju, tí tað kunna tey ikki náa.

- Tað var sanniliga ikki altíð, at tað passaði børnunum at gera okkurt saman við mær ella Ásmundi, bara tí at vit høvdu stundir beint tá.

Tey positivu tekini um, at tað gongur væl fyri familjuna í Svínoy, síggjast best aftur í børnunum. Teir elstu eru búnaðir so nógv upp á tríggjar mánaðir, millum annað tí teir eru slopnir at royna ymiskt, sum teir aldrin høvdu komið til í Havn. Tann eina gentan, sum hevði verið eitt sindur smásár, er glað og lívlig nú. Fyri hana bleiv hetta eitt sera gott upplivilsi, tí hon hevur fingið eina hjartavinkonu, sum búði á oynni áðrenn familjan Guðjónsson kom. Og tey yngru hava eisini víst seg at trívast sera væl. Mathias, sum er 9 ár, treivst ikki serliga væl í skúlanum í Havn. Í dag er hann nógv hugaligari til skúlan. Svínoyar skúli er cool, segði hann glaður, tá ein vika var farin!

Rakul og Ásmundur viðganga, at ein tann størsti brølarin í Havn var, at børnini gingu í trimum ymiskum skúlum.

## Gott og minni gott

Men tað er ikki bara gott at búgva í Svínoy. Tað eru tey bæði foreldrini á einum máli um.

Ásmundur nevnir millum annað tað lítla húsið, sum tey búgva í.

- Hetta er ikki bert idyl, tað er púra vist. Her má haldast ein jarnharður disiplinur, um tað yvirhøvur skal kunna lata seg gera at búgva her. Men sjálvandi kann næstan alt lata seg gera í eitt ár. Men uppá longri sikt, eru húsaviðurskiftini ikki nøktandi, sigur hann.

- Børnini mugu læra at taka upp eftir sær her, tí her ber heilt einfalt ikki til at tveita runt við klæðum, skóm, leikum og øðrum. Tey hava onki kamar sjálvi her, so tey noyðast at halda tað ruddiligt rundan um seg.

Tað tykist sum um Rakul og Ásmundur eru fullgreið yvir, at tey hava verið heppin í summarveðrinum í ár, og at tað liggur ein annaðleiðis strævin vetur fyri framman enn tey eru von við.

- Tað verður eitt privilegium at sleppa at keða okkum. Tað gleða vit okkum til, tí tað hava vit ikki roynt enn, sigur Rakul skemtandi, men kortini er eitt spor av álvara aftan fyri orðini.

Tí her er talan um foreldur, sum bæði hava arbeitt fulla tíð og havt stórt hús og sjey børn at taka sær av, so tað er ei undur í, um tey ikki hava havt stundir til at keða seg.

Rakul sigur, at hon plagar at skemta við børnunum og spyrja, nær tey munnu fara at sleppa at keða seg.

- Tá flenna tey bara at mær. Men tað verður spennandi at vita, hvat vit fara at finna upp á teir longu dagarnar í januar, februar og mars, sigur hon.

So seta tey skemt til síðis aftur, og siga, at tey eru fullgreið yvir, at tey fara at koma at kenna til einsemi. Men tað síggja tey sum eina avbjóðing.

- Vit fara eisini at nýta ein part av vetrinum til at finna útav, hvat vit skulu gera, tá hetta árið er farið aftur um bak. Vit ætla at finna útav á hvønn hátt familjan kann venda styrkt og ment aftur til Havnar og royna at føra eitt familjulív, sum er hóskandi til okkara krøv og tørv sigur Rakul, sum er vís í, at tað munnu vera aðrar familjur, sum hava verið ella eru í somu trongu skóm, sum tey sjálvi vóru í.

- Tað hevði verið super, um eini fimm barnafamiljur komu til Svínoyar afturat, heldur Ásmundur fyri og vísir á, at tað ber til at búgva her um ein kann arbeiða um internetið.

Ferðasambandinum lata tey ikki so væl at. Tey hugsa serliga um, at um tey skula ørindi av oynni, so noyðast tey sum oftast at yvirnátta í Klaksvík ella aðrastaðni. Og tað, at ongin lækni er í bygdini er nakað, sum tey halda er avbera keðiligt eisini, tí tað er ikki bara sum at siga tað. Um brádligur tørvur er á lækna, so verður sjúklingurin fluttur við tyrluni. So her hevur tyrlan so heilt givið sín postiva leiklut

Tey greiða frá, at til konfirmatiónina hjá dreingjunum, sum var herfyri, høvdu tey skrivað alt upp, sum tey skuldu hava, men tá so alt kom til alt, tá stóðu tey og manglaðu pipar.

- Tað eru slík einkul ting, ein ikki hugsar um, tí ein er so vanur við bara at kunna fara og keypa tað onkrastaðni, sigur Ásmund og leggur so aftur at, at í Svínoy er ein jú noyddur at leggja alt betur til rættis, tí logistikkurin í Svínoy er øðrvísi enn í Havn.

At enda vísa tey eisini á, at tey hvør sum ein hava givið avkall upp á nógv. Børnini hava givið avkall upp á skúla, vinir og frítíðarítriv. Og tað hevur óivað ikki verið so lætt fyri tey kortini, men Ásmundur og Rakul royna at læra tey, at tey mugu vera góð hvørt við annað, tí tey hava bert hvønn annan at spæla við.

- Vit høvdu ikki bara flutt soleiðis uttan víðari. Tað er púra vist. Vit vóru her og hugdu eftir húsinum, og fingu greiði á, hvat vit komu at hava brúk fyri, um alt skuldi kunna ganga hjá okkum. Og tá vit høvdu skrivað okkum alt niður, settu vit okkum í samband við ein góðan vin í Danmark, sum kom upp í ein heilan mánaða at hjálpa okkum at gera klárt í húsinum. Uttan hansara hjálp hevði hetta als ikki kunnað latið seg gjørt, siga tey bæði við ein munn.

- Tey flestu, vit tosaðu við um at flyta til Svínoyar, vóru sera positiv, tey hildu tað vera stuttligt, øðrvísi og gott. Tað vóru bert tvey fólk sum hildu okkum vera púra ør, og tað løgna í tí er, at nevniliga hesi bæði fólkini vóru uppvaksin á útoyggj, siga Ásmundur og Rakul, sum eru á einum máli um, at tá foreldrini eru positivt innstillað fyri nøkrum, so ávirkar tað eisini børnini. Og tá alt kemur til alt, so verður tað helst hetta eina árið í Svínoy, sum kemur at standa fremst í minninum hjá børnunum, tá tey verða vaksin.



*Familjan Guðjónsson trívist sera væl í Svínoy*



# Á loppulaki í London

Tað er nakað heilt annað at koma til London fyri at ‘etablera’ seg enn sum áður at koma higar í arbeiðsørindum. Eg upplivi býin annaðleiðis og kanska ikki so fyrikomandi, sum eg annars havi hildið, tá ið eg havi vitjað í styttri tíðarskeið

*Urd Johannesen*



Flogferðin higar (Århus — Stansted) var absolut á bíligasta hátt, einans 170 kr. við Ryanair, eitt írskt flogfelag, sum er kent fyri bíligar ferðaseðlar og onga tænastu, t.d. er eingin matur umborð og alt drekkandi kostar. Men satt at siga saknaði eg nú ikki tann matin, ein vanliga far umborð á flogførum. Hinvegin saknaði eg kensluna av at vera kundi hjá einari fyritøku og tey smílini og tað vinsemið, ein vanliga møtir ókeypis aðrastaðni. Eg hugsaði, at kanska Ryanair gevur starvsfólkunum so lítla løn (ja, onkunstaðni skulu tey spara. . .), at tey kanska bara smílast í frítíðini. Men eg kom til London í øllum góðum, tungt lessað við øllum tí viðføri heimanífrá, sum eg helt vera alneyðugt at hava við.

Tað tyktist, sum fleiri tóku synd í mær, tá ið eg kom knossandi úr tokinum frá flogvøllinum og royndi at finna mær ein leigubil at koyra meg til endastøðina, eitt sokallað Hall of Residence, sum er at líkna við eitt skúlaheim. Komin á rætta stað fekk eg lyklar og annað, sum gevur atgongd BERT til okkum, ið búgva her, og her eru nógvar reglugerðir fyri, hvussu ein má búleikast, eingin óviðkomandi sleppur inn (sigst) og eingin gestur hevur atgongd uttan saman við vertinum. Eg læsti meg inn í íbúðina, tvs at her eru 4 smá kømur, tvey wc við bað og ein køkur at deila.

## . . .loppulak

Tað einasta leysatilfar, ið møtti mær á kamarinum, var eitt Mite Proof Sheet, eitt lak, ið skal halda møguligum loppum vekk frá mínum sovandi korpus. Hugsaði sjálvandi um, at trupulleikin óivað mátti vera til staðar, síðani hetta var hitt einasta, ið ein fær her, tá ið ein flytur inn. Nei, forrestin, har var eisini ein pakki við kunning frá skúlaheiminum, m.a. ein listi, sum eg skuldi krossa av fyri at vita, um alt var sum tað átti. Eg kundi ikki lata vera við at hugsa, at eftirsum einki er her, ikki ein gongd knagar at hanga nakað uppá, so er tað sikkurt tí, at fólk við longum fingrum eisini búgva her. Mín negativi hugsunarháttur vitnar kanska um, at eg ikki kendi meg heilt heima enn. Men eisini var ymiskt annað, sum skundaði undir kensluna, t.d. lá ein lítil bóklingur um, hvussu ein skuldi bera seg at, tá ið ein fór út um kvøldarnar, og hárreisandi dømi um, hvussu illa tað kundi ganga, vóru prentað á permuna ("girl killed for her mobile") og síðani lá eitt tilboð frá einum tryggingarfelag. . .

At hetta er ein milliónbýur merkir eisini, at tað er torført at finna alt tað, sum ein hevur brúk fyri, tá ið ein skal etablera seg mitt inni í London. Fólk arbeiða mitt í býnum, men búgva oftast eitt sindur uttanfyri centrum og tí eru forrætningar a la Maria Poulsen og Bónus ikki altíð nærhendis. So tá ið eg hevði gingið aftur og fram her í grannalagnum í ein hálvan dag, hevði tað eydnast mær at finna okkurt smávegis at eta og eta úr.

Tað er løgið, sum alt er annaðleiðis, ikki minst maturin. Næstan alt er bjálvað í tupum, dósum, t.d. kundi eg keypa ketchup í tupu og mjólk í dunkum. At tað eru nógv fólk, ið búleikast einsamøll og kanska arbeiða nógvar tímar um dagin sæst aftur í tí ørgrynnu av viðgjørdur mati til ein ella maximum tveir persónar, sum ein bara skal hita har heima. Tá eg umsíðir fór undir at gera mína fyrstu máltíð, varð tað eitt samsurium at vatndeyvum/deyðum? spagetti (hevði gloymt at keypa salt..) ’al dente’ uttan fyllu, tí eg hevði eisini gloymt at keypa ein dósaopnara til tær flongdu tomatirnar og tunfiskin. Ikki nógv annað at gera enn at fara í song, tí her var einki sjónvarp, ongin fløguspælari og ongin bók, og hini trý, sum eg skuldi búgva saman við, vóru ikki komin enn, so her var bert eg í einum farvileysum kamari á einum plastik anti-loppulaki, tí seingjarklæðini vóru send frammanundan og lógu trygt og gott í einum kufferti hjá einum vini í hinum endanum av London.

Meðan eg royndi at sovna var ikki sørt, at eg ynskti, at lopp-urnar dugdu at tosa ella um ikki annað kundu rura meg í blund.

## . . .abs(urd)

Viskistykkir kunnu eisini nýtast til hondklæði. Hetta ásannaði eg, tá ið eg morgunin eftir fór í bað vælvitandi at hondkløðini lógu í sama kufferti sum seingjarklæðini. Eg hevði keypt 3 viskistykkir í einum pakka dagin fyri og hetta kom væl við, eitt til hvørja región. Hóast eingin var her at taka mynd og ’foreviga’ meg við skúlatasku á bakinum, so kendi eg meg ikki sørt sum ein næming á veg í skúla á fyrsta sinni. At eita Urd í einum fremmandalandi er ikki heilt lætt, einamest fyri hini, sum mær faktisk tókti synd í, tá ið tey royndu at rulla tunguna á rættan hátt og úttala navnið meðan tey allarhelst ynsktu, at tey ongantíð høvdu spurt, hvussu eg æt. Eg fann útav, at lættast var, um eg bað tey siga ’absurd’ og taka teir 3 fyrstu bókstavirnar vekk.

Sum einasti skandinavi henda dagin, kendi eg meg eitt sindur ’out of place’, tí fólk, tá ið tey hittast fyrstu ferð, heilt automatiskt hava tað við at leita saman við teirra sameindu, teirra egnu tjóðarfelagum, og her vóru fleiri úr Italia, Hellas, Japan, Korea, Onglandi. At koma úr Føroyum fær tey flestu at kenna skomm, tí antin royna tey at lata sum um tey vita, hvar tað er (og ræðslan fyri at verða avsløråð fær tey skjótt at ’mingla’ víðari til tann næsta) ella eisini viðganga tey rodnandi, at tey als ikki vita, hvar oyggjarnar eru. Helt, at kanska tann eina gentan úr Eysturríki visti um Føroyar eftirsum vit fingu alla verðina á gos, tá ið vit vunnu á teimum í fótbólti. Men nei, heldur ikki hon, og eg havi valt at tiga við hesum. . .enn, tað verður kanska ein ’jokari’ einaferð til eitt seinni høvi.

Bert tann eina úr Onglandi kendi til Føroyar. . . "men vit fara ikki at tosa um hvalaveiðu á hesum sinni" var hennara inngangsbøn.

## . . .ensk fyrisiting

Áðrenn eg kom higar, hevur nógv samskifti verið aftur og fram millum meg og lærustovnin, og tað hevur undrað meg, hvussu ofta eg havi útfylt oyðibløð, ið øll skulu hava svar uppá teir somu spurningarnar, og eg bleiv ikki minni yvirraskað, tá ið eg, komin á rætta staðið, aftur skuldi til at útfylla onnur oyðibløð við júst somu spurningum. Eg ímyndaði mær, at tær teldu-leysu skrivstovurnar máttu verða á tambi við ringbindum við øllum upplýsingunum. Sjálvsagt var hetta ikki veruleikin, men allíkavæl virkaði ensk fyrisiting stirvin og gomuldags samanborið við okkara. Helt eisini, at tað var eitt sindur tvørligt, at vit næmingar á einum sera vælkendum lærustovni innan ’management’ (leiðslu og fyrisiting) máttu nýta ein hálvan dag í einari kø fyri at verða skrásett. Ei undur í, at onglendingar eru verðinsmeistarar í at standa í kø. Tá ið tað umsíður varð mín túrur at verða skrásett, stóð eg knappliga yvirfyri einum løgnum trupulleika. Eg var skrásett sum ES lesandi og ikki ’overseas’(tvs øll uttanfyri ES), eins og eg minst 10 ferðir havi kunnað um á omanfyri nevndu oyðibløðum. Maðurin hinumegin borðið hugdi undarliga at mær, tá ið eg segði við hann, at eg átti at gjalda meira enn skrivað var á pappírinum, tí eg hevði søkt sum føroyingur og Føroyar vóru ikki limir í ES. Hetta skapti eitt sindur av turbulensi rundanum meg, eingin visti hvat og hvussu, og eg endaði so aftast í køini aftur, meðan trupulleikin varð kannaður á rætta stað. Eingin loysn var tó funnin, so eg eri nú skrásett sum ES-lesandi, væl at merkja móti mínum vilja. "Tú er ein sera erligur persónur" vóru seinastu orðini til mín, tá ið eg umsíður slapp at reisa meg frá borðinum. Aja, hugsaði eg, so lat tað vera mín skriftstavur, meðan eg sendi ein tanka til Karstin Hansen, tí eg nú hevði spart landskassanum helmingin av tí, sum eg veruliga átti at kosta.

. . .komin heim var eg so vælsignað fegin um mítt lítla kamar, ja sjálvt mítt fitta loppulak, tí nógvir av mínum skúlafelagum høvdu einki stað at búgva í og nýttu tað mesta av tíðini at leita eftir íbúð. Tað er gott at fáa reviderað sína smølu og forkelaðu tankagongd viðhvørt, bert spell, at tað má ganga út yvir hini, áðrenn ein sær, hvussu heppin ein veruliga er. At loppurnar doyggja í hunguri í mínari matrassu má bara verða harvið. Heilt erligt.

# Rannvá og Aldubáran í Oslo

FØROYSK LIST

Leygardagin í komandi viku letur framsýning upp í Galleri 27 í Kristian Augusts gate 7 í Oslo við føroysku listakvinnuni Rannvá Konoy. Framsýningin er í sambandi við útnorðurdagarnar, sum eitt nú Norsk-Færøysk Lag skipar fyri. Framsýningin er opin til 1. des.

Hetta er fyrstu ferð, at Rannvá Konoy, sum hevur fingið listarliga útbúgving í London, sýnir fram list sína í Noregi. Hon hevur fingið sera góð ummæli, serliga hevur tað vakt ans, at hon hevur fingið góð ummæli frá viðurkendum bretskum ummælarum.

Hálvan november spælir føroyski bólkurin Aldubáran klassiskan og fólkasligan tónleik í Oslo. Tey eru á ferð runt um í Norðurlondum í døgunum 7. til 17. nov. Á ferðini í Noregi fara tey eitt nú at spæla verk eftir Sunnleif Rasmussen, sum fekk Tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins í ár.

